# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og um kvøldið regn. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi, sunnudagin upp í ein strúk.
Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 13 og 17 stig.

# Kennist nakar við málningin?

Hesin málningurin er keyptur í einum handli í Keypmannahavn og hongur nú í heiminum hjá Sonju Kristiansdóttir og Svavar Benadiktson í Kópavági í Íslandi, sum eiga málningin.

Sonja er føroysk, ættað úr Húsavík, dóttir Elisabeth, úr Hørg í Sumba, og Kristian Danielsen í Húsavík.

Einaferð tey vóru í Keypmannahavn, sóu tey málningin í einum handli, sum selur gamlar lutir. Tá tey so trý á seinni komu inn í sama handil, og málningurin framvegis ikki var seldur, keyptu tey hann.

Málningurin er av eini fullriggaðari slupp við ein lítlum báti hangandi afturúr. Sluppin er nr. FD1 og hevur føroyskt flagg málað á síðuna. Málningurin er signeraður SB.

Um onkur kennist við málningin, veit hvør hevur málað hann og hvør sluppin er, er viðkomandi vælkomin at seta seg í samband við Jákup Andrias Arge á tel. 316551 ella 216551.



## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 22 |
| London | 27 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 26 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 29 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 20 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 38 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 14 |
| New York | 20 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 28 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 14 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 994 hPa. skamt vestan fyri Føroyar fer skjótt í landnyrðing og dýpist. Brúgvalagið haðani til Føroya fer eystureftir. Ein hátrýstryggur, 1021 hPa. vestan fyri Ísland verður yvir Føroyum mikudagin.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir. Brúgvalagið haðani fer um Føroyar mikukvøldið

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/6 kl. 06⁰⁰– 13/6. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juni: -0,3° - Mesti hiti máldur í mai: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,9 mm – mált frá 12/6 kl. $06^{00}$– 13/6 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juni: 17,8 mm






## VESTFALLSKYRRINDI

11. juni Fullmáni
16. juni Mánin næstur jørðini
18. juni Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. juni | 08.41 | 21.08 | 07.41 | 20.08 | 07.56 | 20.23 | 10.41 | 23.08 | 11.41 | - | 06.56 | 19.23 | 05.56 | 18.23 | 08.56 | 21.23 | 09.56 | 22.23 | 08.26 | 20.53 | 09.41 | 22.08 |
| 14. juni | 09.35 | 22.01 | 08.35 | 21.01 | 08.50 | 21.16 | 11.35 | - | 00.08 | 12.35 | 07.50 | 20.16 | 06.50 | 19.16 | 09.50 | 22.16 | 10.50 | 23.16 | 09.20 | 21.46 | 10.35 | 23.01 |
| 15. juni | 10.28 | 22.52 | 09.28 | 21.52 | 09.43 | 22.07 | 00.01 | 12.28 | 01.01 | 13.28 | 08.43 | 21.07 | 07.43 | 20.07 | 10.43 | 23.07 | 11.43 | - | 10.13 | 22.37 | 11.28 | 23.52 |
| 16. juni | 11.16 | 23.40 | 10.16 | 22.40 | 10.31 | 22.55 | 00.52 | 13.16 | 01.52 | 14.16 | 09.31 | 21.55 | 08.31 | 20.55 | 11.31 | 23.55 | 00.07 | 12.31 | 11.01 | 23.25 | - | 12.16 |

Sosialurin